# LADA – ein bíligur bilur

**Vilt tú hava ein bíligan nýggjan bil – sum einans kostar 85.000 kr, so hevur tú møguleikan við at ogna tær ein Lada**

BILAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað er Autotrade í Havn, sum í útvið tvey ár hevur havt umboðið upp á Lada í Føroyum. Seldir eru góðir 30 bilar síðan á vári í 2003. Tá hevði eingin Lada verið seldur í Føroyum í 13 ár.

Tað er General Motors, GM, sum hevur keypt umleið helmingin av gomlu Ladaverksmiðjuni í Russlandi, og hóast Lada enn eru teir gomlu Lada, so er ein spildur nýggjur Lada á veg. Hann væntast á marknaðin komandi vár.

Autotrade í Havn, sum umboðar Lada í Føroyum, hevur 13 bilar á goymslu.

Tá tú sigur Lada, so eru tað nógv sum hugsa, at tá livir góðskan ikki upp til tað, ið er vanliga kravið í Vesturheiminum.

– Danskir bilaummælarar hava serliga funnist at Lada, tí hann ikki hevur airbag, men bilurin er kortini góðkendur eftir ES-direktivum, sum vanliga seta airbag sum minsta krav, sigur Jens Pauli Dahl, stjóri hjá Autotrade.

Fólk, ið keypa Lada, hugsa fyrst og fremst um prísin og um nýtslutørvin. Jens Pauli Dahl sigur, at fólk í øllum aldri hava keypt bilin.

Hesin bilurin, Sosialurin royndi, er ein Lada 112 Hatchback. Hann hevur fimm hurðar, heldur rúmligur bilur við stórari baklúku og baksetrum, sum kunnu leggjast niður hvør sær.






*Motorrúmið minnir ikki sørt um ein vanligan bil okkara leiðum*




*Ladabilurin er broyttur í mun til tann traditionella, vit kendu frá sjeytiárunum. Hann er teknaður fyrst í nítiárunum og farin í framleiðslu um aldarmótið, tó at hann mest minnir um ein evropiskan bil frá áttatiárunum*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*






Toyota Prius II frá P/f Reyni Servic:

# Koyrir uttan at ljóð hoyrist

**Toyota Prius II er heimsins mest framkomni og umhvørvisvinarligi familjubilur í miðalklassanum. Bilurin, sum verður drivin av bæði bensin og el, hevur fingið óteljandi heiðurslønir um allan heim**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í Gyldendals leksikon stendur, at orðið »hybrid« er av grekskum uppruna og merkir »krydsning mellem to nærtstående arter eller racer«.

Tað er ein løgin kensla at koyra ein royndartúr við hybridbilinum Toyota Prius II í ferðsluni. Man setur seg við rattið við billyklinum í lummanum, heldur fótin á bremsupedalini, trýstur á startknøttin og setur lítlu girstongina, sum minnir um eitt joystick, í D (drive). Síðan fara motorarnir og battaríini til arbeiðis.

Vit koyrdu fullkomiliga ljóðleyst gjøgnum miðbýin í Havn, og á skígganum í instrumentborðinum stóð, at bensinnýtslan í løtuni var 0.0 km/l. Á skígganum kann man fylgja við, hvar bilurin fær orkuna frá, meðan hann koyrir, um tað er frá bensin ella elmotorinum ella frá battaríunum. Eisini hvat aktuella bensinnýtslan er.

Prius er ein bilur við tveimum samanbygdum motorum, einum 4 syl. bensinmotori við 78 hk, og einum el-motori við 68 hk.

Hybridkonseptið virkar soleiðis, at bensinmotorurin og el-motorurin supplera hvønn annan, og syrgja fyri at bilurin altíð koyrir optimalt, bæði hvat kraft, økonomi og umhvørvisvernd viðvíkur. Upp til umleið 50 km/t koyrir bilurin bert við el-motorinum.

Battaríini, sum liggja í dúrkinum, geva streym til el-motorin og verða lødd upp av bensinmotorinum.

Prius hevur elektroniskt »start & stop«, t.v.s. at tá bilurin stendur stillur, steðga motorarnir og starta aftur, tá bilførarin traðkar á spitaran. Í býkoyring kann hetta ganga fullkomiliga ljóðleyst fyri seg, og dálkingin er eingin, tá bilurin bert koyrir við el-motorinum.

Toyota eru av tí fatan, at hybridtøknin er eitt tað mest realistiska boðið uppá ein optimalan umhvørvisvinarligan familjubil.

Prius hevur fingið óteljandi heiðurslønir um allan heim, og bilurin fær eisini loyvi at koyra inni í miðbýnum í fleiri av heimsins stórbýum, har bilferðsla annars er bannað vegna dálking.




*Toyota Prius II er heimsins mest framkomni og umhvørvisvinarligi familjubilur í miðalklassanum*



*Á skígganum kann man fylgja við, hvar bilurin fær orkuna frá, meðan hann koyrir, um tað er frá bensin ella el-motorinum ella frá battaríunum. Eisini hvat aktuella bensinnýtslan er*

## Toyota Prius II Hybrid

| | |
|---|---|
| Motorur I: | 1,5 litur 4 syl bensin 78 hk |
| Motorur II: | El-motorur við 68 hk |
| 0-100 km/t: | 10,9 sek |
| Bensinnýtsla: | 23,3 km/l (blandað koyring) |
| Støðd og vekt: | |
| Longd | 445,0 cm |
| Breidd | 173,0 cm |
| Hædd | 149,0 cm |
| Eginvekt | 1.300 kg |
| Prísur: | 328.600,- |
| Søluumboð: | Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 353040<br>www.reyniservice.fo |




*Prius hevur fingið óteljandi heiðurslønir um allan heim*